# Selt trý pør av hosum

**Tummas Jóhann Sigvardsen gongur í 9. flokki í Eysturskúlanum. Hann er nú í starvsvenjing í mótahandlinum Jack and Jones**

STARVSVENJING

*Orð og mynd: Jákup Mohr Müller og Rannvá Tryggvadóttir*

Tummasi dámdi væl at vera í starvsvenjing har, og hann hevði ætlanir um at verða handilsmaður sum eldri.

Vit spurdu hann eisini um hvat hann hevði gjørt har og hvat hann hevði selt. Hann segði at hann hevði selt hevði trý pør av hosum og hevði rudda handilin og lagt klæðir uppá pláss í 2 dagar.

Og starvsfólkini helt hann vera ordiliga fitt.

**Sp.:** *Hvat hevur tú selt í dag?*
**Sv.:** Trý pør av hosum.

**Sp.:** *Hvat hevur tú gjørt?*
**Sv.:** Rudda, staðið við kassan, lagt klæðir uppá pláss.

**Sp.:** *Hví valdi tú hetta starvið?*
**Sv.:** Eg ætli mær at arbeiða í klædnahandli seinni.

**Sp.:** *Hvar fert tú næstu ferð?*
**Sv.:** Formula ella Sosialin

**Sp.:** *Hvussu eru starvsfólkini?*
**Sv.:** Fitt.

**Sp.:** *Er hetta nakað tú kundi hugsað tær at gjørt í framtíðini?*
**Sv.:** Heilt avgjørt!



*At selja klæðir er avgjørt nakað, sum eg kundi hugsa mær at fingist við í framtíðini, sigur Tummas Jóhann Sigvardsen, ið hevur verið í starvsvenjing í Jack & Jones*

# Sera áhugaður í móta

**Jannich Hjaltalin, sum gongur í 9. flokki í Eysturskúlanum er í starvsvenjing í mótahandlinum Skálki**

STARVSVENJING

*Orð og mynd: Jákup Mohr Müller og Rannvá Tryggvadóttir*

Honum dámdi óføra væl at vera har, og hansara starvsfelagar róstu honum nógv fyri hansara stóra innsats.

Hann hevði eisini ætlanir um at fáast við móta sum eldri.

Hann hevði selt nakrar T-shirts, nakrar buksur og annað tann dagin. Og hann var heilt vísur í, at hann fór at fáast við klæðir ella eiga ein klædnahandil sum eldri.

**Sp.:** *Hvat hevur tú selt í dag?*
**Sv.:** Blusur og T-shirts.

**Sp.:** *Hvat hevur tú gjørt?*
**Sv.:** Staðið við kassan og sett vørur uppá pláss.

**Sp.:** *Hví valdi tú hetta starvið?*
**Sv.:** Eg eri sera áhugaður í móta og klædnahandli.

**Sp.:** *Hvar fert tú næstu ferð?*
**Sv.:** Til onkran designara

**Sp.:** *Hvussu eru starvsfólkini?*
**Sv.:** Mega fitt

**Sp.:** *Er hetta nakað tú kundi hugsað tær at gjørt í framtíðini?*
**Sv.:** Tað er 100 %.



*Jannich Hjaltalin hevur fingið nógv rós fyri sítt arbeiði sum starvspraktikantur í Skálki*

